*Arnfríð við nýggjari útgávu:*

# HETTA HEVUR ALTÍÐ VERIÐ MÍN DREYMUR



Vit kenna hana øll frá Kulum Rótum, men seinastu árini hava vit ikki hoyrt tað nógva frá songfuglinum Arnfríð Lützen. Men í næstum fáa vit tó øll henda møguleikan, tá Arnfríð kemur við eini spildurnýggjari fløgu á marknaðin

**Lív Højsted Horsdal**
**horsdal@sosialurin.fo**

Hetta er fyrsta fløgan, Arnfríð hevur givið út, og hóast fløgan ikki er til taks fyrr enn um 3-4 mánaðir, eru fyrreikingarnar komnar væl ávegis.

- Í seinastuni havi eg bert sungið okkurt smávegis á veitslum o.t. Eg havi havt úr at gera í skúlanum, og so eigi eg eisini eina fýra ára gamla dóttir, ið sjálvandi krevur sítt. Men nú havi eg valt at gera meira við tónleikin, og tá tað eitt kvøldið vísti seg, at møguleikin var har, ivaðist eg onga løtu.

**Egin løg**

Nýggja fløgan hjá Arnfríð, ið fer at hýsa um 10-15 sangum, verður mest grundað á nýggj løg, ið ikki eru spæld áður. Og eisini hevur Arnfríð sjálv í ferð við at gera onkran sang.

- Í løtuni eri eg í ferð við at leggja seinastu hondina á tvey løg, eg havi gjørt. Annars eru fleiri tónleikarar komnir til mín við nýggjum løgum, teir hava gjørt. So, sum nú er, ætli eg mær næstan bara at hava nýggj løg á fløguni. Tó havi eg eisini í hyggju at taka eitt ella tvey gomul løg við, ið eg havi sungið til onkra útvarpssending, og so verður møguliga eisini eitt 'coverlag' á fløguni.

**Blandaður tónleikur**

Á komandi fløguni hjá Arnfríð fara vit at hoyra fleiri tónleikagreinar – bæði 'fólkadjass', popp og rokk, so tónleikurin á fløguni er rættiliga blandaður. Flestu sangirnir á fløguni eru um kærleika og brennandi kenslur til Føroyaland, og verða teir sungnir bæði á føroyskum og enskum:

- Eg havi valt at syngja á bæði føroyskum og enskum, tí mær dámar væl, tá ein fløga er blandað. Eg vil samstundis eisini fegin hava, at fløgan hóskar til øll. – Teimum eldru dámar ofta best at hoyra føroyskan tónleik, meðan teimum ungu ofta betur dámar sangir á enskum.
Enn havi eg ikki hugsað um at selja fløguna í útlondum, men um møguleikin kemur, fari eg bara at umseta tey føroysku løgini til enskt.

Umframt Arnfríð sjálva fer systirin Rannvá Lützen eisini at syngja kór á fløguni. Hvørjir tónleikararnir verða á fløguni, er enn ikki greitt, men Kim Hansen, Ingi Isaksen, Magni Husgaard og Steintór Rasmussen verða í øllum førum við í verkætlanini.

**Fløgan altíð verið ein dreymur**

Síðan Arnfríð fór at syngja, hevur tað verið ein stórur dreymur at geva eina fløgu út:

- Eg havi ætlað at givið eina fløgu út sera leingi – heilt síðan eg byrjaði at syngja við Kulum Rótum. Henda fløgan verður tó heilt øðrvísi enn tað, eg higartil havi sungið á fløgu, so tað er kanska líka nógv fyri at prógva, at eg eri komin víðari og havi ment meg. Kular Røtur vendu sær til børnini, men nýggja fløgan er til allar aldursbólkar.

**Fløguhúsin einfaldur**

Jastrid Gullaksen fer at sniðgeva fløguhúsan, men Arnfríð hevur tó longu sínar ætlanir um, hvussu hann skal síggja út.

- Helst verður onkur mynd av mær á permuni, men annars skal húsin verða rættiliga einfaldur. Annars vil eg eisini sera fegin hava sangtekstirnar prentaðar inni í fløguhúsanum. Eg haldi, tað er ótolandi, tá fløgur ikki hava tekstin við. Sjálv fái eg altíð hug til at syngja við, tá eg hoyri ein góðan sang, men ferð eftir ferð eri eg vorðin vónbrotin, tá eg havi funnið útav, at ávísar fløgur ikki hava sangtekstirnar við. So tá eg keypi nýggjar fløgur nú, plagi eg ofta at hyggja inní fyrst at vita, um tekstirnir eru við.

**Framtíðin?**

Tá fløgan er liðug, ætlar Arnfríð sær at fara á eina lítla konsertferð. – Serliga hevur hon í hyggju at syngja á ymiskum stevnum, serliga Norðoyastevnuni og kanska onkrum festivali. Men hvat framtíðin annars hevur at bjóða, hugsar Arnfríð dagliga ikki nógv um:

- Eg havi altíð elskað at sungið, men havi hóast hetta ongantíð hugsað um, at eg skuldi verða songkvinna burturav. Men um tað einaferð hevði staðið mær í boði at liva av tónleikinum, hevði eg avgjørt tikið av. Men fyri føroyingar flest er hetta sera trupult og tískil ikki nakað, eg einans strembi eftir.

Arnfríð Lützen er sera spent at vita, hvussu fløgan fer at verða móttikin:

- Tað er rættiliga trupult at siga, men sjálvandi vóni eg, at fløgan fer at verða væl móttikin. Eg royni bara at gera mítt besta, og í høvuðsheitum gevi eg ikki fløguna út fyri at vinna pening, men heldur fyri at fáa eitt gott upplivilsi, og tí tað altíð hevur verið ein stórur dreymur.

**Arnfríð Lützen: 23 ár, býr í Klaksvík og arbeiðir á Shell.**

**- Nær byrjaði tú at syngja?**
Eg havi sungið, líka síðan eg minnist.

**- Nær sangst tú fyri fyrstu ferð á palli?**
Tá eg var 8 ára gomul, sang eg í ítróttahøllini á Skála saman við country sangaranum Símun Konoy.

**- Hvørji ráð hevur tú til teirra, ið ætla at fáast við tónleik?**
At geva sær góða tíð, at trúgva á seg sjálvan og halda fast við sítt - endiliga ikki bara lurta eftir ráðum frá øðrum.